# Fyrsta fugla-fellan sett upp í Nólsoy

*Við fuglafelluni verður nú gjørligt at fanga, kanna og ringmerkja fugl, ið vitjar í Føroyum. Talan er eisini um fuglasløg, ið eingin hevur sæð í Føroyum fyrr* **síða 19**



*Dorete Bloch Danielsen vígar fyrstu veruligu fuglafelluna í Føroyum, ið er ein sokallað Helgolands-rúsa. Fuglastapparin í Nólsoy, Jens-Kjeld Jensen, ið sæst á myndini høgrumegin, skal ansa eftir felluni og fanga, kanna og ringmerkja fugl komandi tvey árini. Tað er hann, ið saman við Petur Hans Hansen í Nólsoy hevur gjørt felluna* **Mynd: Kalmar**



*Jens-Kjeld Jensen við fuglafelluni – hon kallast ein Helgolands-rúsa – ið er tann fyrsta í Føroyum av sínum slagi. Nú fer at bera væl til at gera kanningar av fugli og ringmerkja fugl í Føroyum* **Mynd: Kalmar**

# Fyrsta fuglafellan

## *Mikudagin varð fyrsta veruliga fuglafellan í Føroyum, ið ger tað møguligt at fanga, kanna og ringmerkja fugl, tikin í nýtslu úti í Nólsoy*

Hóast mong eru í Føroyum, ið hava áhuga fyri fugli, og eitt nú Náttúrugripasavnið ger eitt stórt arbeiði, hava ongantíð verið umstøður til at gera veruligar kanningar, ið kunnu staðfesta, hvørjir fuglar ferðast um okkara leiðir, hvagar teir fara og hvaðani teir koma.

Nú er kortini eitt stórt stig tikið, ið kann tryggja, at júst hesi ting, ið ikki hava latið seg gjørt áðrenn, nú kunnu lata seg gera, og tað fer at bera til at fáa nógv meira at vita um fuglalív í Føroyum og hvørjir fuglar vitja um okkara leiðir.

Mikudagin vígdi Dorete Bloch Danielsen frá Náttúrugripasavninum ta fyrstu veruligu fuglafelluna, ið er sett upp í Føroyum.

Fellan er sett upp í garðinum uttan fyri húsini hjá Niels á Botni, sála, har bæði hann, og undan honum eisini pápi hansara, hava sæð nógvan sjáldsaman fugl gjøgnum mong ár. Feðgarnir høvdu báðir stóran áhuga fyri fugli og fuglalívi, so tað er heilt í teirra anda, at tann fyrsta fuglafellan í Føroyum er sett upp júst á hesum stað.

Tað verður fuglastapparin í Nólsoy, Jens-Kjeld Jensen, ið fer at taka sær av ansingini av felluni, ið krevur at onkur er um hana hvønn einasta dag, hon stendur uppi.

– Frammanundan havi eg við einum spegilsneti gjørt eitt sindur við at fanga fugl her, men tað er so nógvur fuglur, tú ikki fært fatur á soleiðis, so tí hevur tað verið eitt ynski at fáa sett eina veruliga fuglafellu upp, sigur Jens-Kjeld við Tíðindablaðið Sosialin.

– Tá eg í fjør var ein túr í Litavia, sá eg slíkar fuglafellur, umenn tær ikki vóru heilt sama slag. Tær høvdu vit ikki fingið brúkt í Føroyum, tí tá vindmegin kom upp á fýra, vórðu tær tiknar niður. Tí sá eg beinanvegin, at okkurt mátti til, ið toldi føroyska veðurlagið, so tað skuldi bera til at fáa nakað burtur úr einari sovorðnari fellu.

Fellan er av einum slagi, ið verður rópt Helgolandsrúsa. Navnið stavar frá, at hetta slagið av fuglafellum varð uppfunnið í týska landslutinum Helgolandi fyri einum hundrað árum síðani.

– Arbeiðið við at fáa eina sovorðna fellu er ikki ókeypis, men har hevur júst Dorete Bloch Danielsen verið til stóra hjálp, og tað eydnaðist henni at fáa stuðul til vega frá norðurlendska ráðharraráðnum, ið hevur játtað pening til gerðina av felluni sum eitt sokallað »pilot-prosjekt«. Tað vil siga, atvit royna at gera eina fellu av hesum slagnum, ið er innrættað eftir føroysku veðurviðurskiftunum, so eisini onnur øki í Norðurlondum, ið kenna til hetta veðurlagið, kunnu fáa gagn av henni seinni, tá vit hava gjørt okkum størri royndir við, hvussu hon virkar, sigur Jens-Kjeld.

Hann skal fyribils ansa eftir felluni í tvey ár, og tað er av áhuga, at hann er farin undir hetta. Ein av orsøkunum til, at eingin sovorðin fella áður er sett upp í Føroyum, hevur nevniliga verið, at Náttúrugripasavnið ikki hevur havt fólk til taks, ið kunnu taka sær av ansingini.

– Tað er týdningarmikið, at tað er onkur, ið kennir eitt sindur til fugl, ið tekur sær av felluni, tí væntandi koma fleiri sløg av fugli í felluna, ið vit kenna lítið og einki til um okkara leiðir frammanundan.

Hetta hevur eisini víst seg í royndartíðini, síðani fellan varð liðug. Teir fjúrtan dagarnar, fellan hevur staðið uppi og hevur verið roynd, er okkurt fuglaslag komið í hana, ið als ikki er kent í Føroyum frammanundan og sum eingin visti av fanst í Føroyum.

– Fleiri líknandi fuglastøðir eru í londunum rundan um okkum, har fuglar verða fangaðir, kannaðir og ringmerktir, og vit hava eitt nú fingið onkran fulg í felluna í royndartíðini, ið kom frá Fair Isle, ið liggur millum Skotland og Hetland, sigur Jens-Kjeld.

Í royndartíðini eru eisini onkrar broytingar gjørdar, so fellan hóskar til føroysk viðurskifti.

Tað eru Jens-Kjeld Jensen og Petur Hans Hansen í Nólsoy, ið hava gjørt fuglafelluna.

hj.



*Helgolands-rúsan varð mikudagin vígd av Dorete Bloch Danielsen* **Mynd: Kalmar**



*Rúsan er skræddaraseymað til garðin, har hon er sett upp* **Mynd: Kalmar**